


# Lív og litir í Kongagøtu



GG: Handilin læt upp fyrst í desember!

Føroyskar pyntidukkur fáa eitt rættiligt spælipláss at boltra sær á, nú altjóða vakurleikarøðin Make Up Store letur upp í Havn

Í Kongagøtu er rokaligt í dag. Svartmálaði handilin er á tremur við pappkassum við vørum og útgerð, sum verður sett upp á serligar hillar til endamálið.

Ein svenskur serfrøðingur er komin til landið at leggja lag á, nú handilsketan Make Up Store letur upp í Føroyum. Eigararnir mugu fylgja strongu reglunum fyri innrætting og skipan av gerandisdegnum, tí altjóða brandið krevur nevniliga, at óansæð, um tú fert inn í ein Make Up Store í London, Rom ella Havn, er konseptið, tilboðini, nýggjheitirnar, lýsingarnar og vøruúrvalið júst tað sama.

## Ein heimur av litum

Elskar tú at spæla spæla tær við litir og glimmur, so verður nýggi sminkuhandilin í Kongagøtu eitt paradís fyri teg. Eyðkenni við røðini Make Up Store er risastóra úrvalið av litum, sum kunnu setast saman alt eftir tørvi.

– Vit fevna um alla litrøðina, líka frá løttum gerandis til galla og drag queens, sigur 26 ára gamla Hanna Reinert Davidsen, sum saman við 36 ára gomlu systrini, Miriam Reinert Olsen, hevur tikið stig til handilin.

– Tað, sum eg haldi vera so stuttligt við røðini er, at til ber at kombinera vørurnar og litirnar. Tú kanst blanda øll tingini saman, skapa tíni egnu look og brúka tað, sum tú vilt. Til dømis kanst tú brúka



eygnaskuggarnar á varrunum og kinnareytt á eygunum, forklárar Miriam Reinert Olsen, og skoytir uppí, at røðin er til øll fólkasløg, kyn og aldursbólkar, og at tey altíð læra kundan at brúka smyrslið.

## Manglaði í Føroyum

Miriam er júst flutt heim til Føroyar aftur eftir fleiri ár í danska makeup umhvørvinum.

Hon og systirin hava altíð saknað ein sminkuhandil við góðskumakeup, breiðum úrvali og miðalprísum í Føroyum. Og tær vita, at nógvar føroyskar kvinnur keypa seg fátækar í makeup frá Mac og Make Up Store, tá tær fara niður ein túr.

## Førleikarnir lokkaðu

Vanliga vilja stóru altjóða merkini onki hava við Føroyar at gera. Vit eru ov smá og fá, so tað loysir seg snøgt sagt ikki, at lata upp deild her á landi.

Kortini eydnaðist tað Miriam, eftir tógvið stríð, at lokka víðagitna altjóða make-up brandið til Føroyar.

Tað, sum gjørdi munin, so tey til endans gávu seg var, at Miriam Reinert Olsen er so serstakliga væl skikkað at reka ein professionellan